# Eitt tignarligt minningarhald

MINNINGARHALD
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Magni Arge stjóri á Atlantic Airways sigur, at minningarhaldið við Sørstokken Flogvøllin á Stord var ein tignarlig løta, sum var ógvuliga væl tilrættaløgd. Magni heldur, at tað var gott fyri tey avvarðandi at koma saman og minnast tey, sum doyðu. Talan er sjálvsagt um eina hending, sum øll vildu verið fyri uttan. Men hann heldur, at tey avvarðandi høvdu tørv á at koma saman, nú eitt ár er farið síðani ræðuligu flogvanlukkuna.

120 fólk luttóku á minningarhaldinum. Oddmar, maður Guðrun Joensen avdúkaði minnisplátuna, og báðir synirnir, Borgar og Eigil, tendraðu ljós, og løgdu rósur á staðið.

Ein vegur er beint oman fyri staðið, har flogfarið hjá Atlantic rendi á.

Minnisplátan er at finna har. Nøvnini av teimum fýra, sum lótu lív í flogvanlukkuni eru rist í minnisplátuna.

**Tey, ið lótu lív vóru:**

*Guðrun Hervør Joensen*
*Jarle Reime*
*Per Olaf Skjæveland*
*Martin Charles Evertsen*



*Umleið 120 fók vóru til minningarhaldið á vanlukkustaðnum við flogvøllin á Stord í Noreg mikudagin*





*Oddmar Gudmundsen, maður Guðruna, avdúkaði minnisplatuna við nøvnum hjá teimum fýra, sum lótu lív í flogvanlukkuni fyri einum ári síðani*